P/f Esso selt í New York

— Heimsins størsta fyritøka strikar nú eisini Føroyar og Danmark á korti sínum

Fyrrapartin hósdagin varð eitt føroyskt partafelag selt í New York.

Prísurin er ókendur.

Í øllum førum kundu hvørki Knút P. Jacobsen, sølustjóri hjá P/f Esso, ella Ivan Pors Fischer, marknaðarstjóri hjá Dansk Esso A/S, upplýsa prísin á tíðindafundi í Havn seinnapartin hósdagin. Teir kendu hann ikki.

Tað, sum hendi í New York hósdagin, var, at Statoil keypti ognirnar hjá Exxon Co. í Dansk Esso A/S og P/f Esso.

Yvirtøkan verður 1. juli í ár.

Eisini Svensk Esso

Tað tykist nú heilt greitt, at Exxon, sum er heimsins størsta fyritøka, er farin at telja dagar sínar í Norðurlondum. Í fjør seldi Exxon Svensk Esso. Keyparin var tann sami: Statoil. Heldur ikki tá bleiv prísurin almannakunngjørdur.

Hildið verður, at norska ríkisfyritøkan noyðist av við í hvussu so er eina milliard fyri Dansk Esso og P/f Esso.

Exxon hevur eisini áhugamál í Finnlandi og Noregi. Gitingar eru nú um, at Exxon eisini fer at sleppa sær úr Finnlandi. Hinvegin fer amerikanska risafyritøkan at varðveita støðu sína í Noregi.

Orsøkin til sølurnar í fjør og hósdagin er tann stóra broyting, hend er í oljuidnaðinum í seinastuni, varð upplýst á tíðindafundinum hósdagin.

Ongin broyting

Eigaraskiftið fer tó ikki at hava við nakra broyting fyri starvsfólkið og viðskiftafólkið hjá Esso. Tey fyrstu, sum fingu at vita um søluna, vóru starvsfólkini í Danmark og Føroyum. Síðani varð hildin tíðindafundur, samstundis í Keypmannahavn og Havn, har tíðindini vórðu almannakunngjørd.

Og hóskvøldið vórðu send brøv til viðskiftafólkið.

Eini 100 fólk arbeiða fyri Esso í Føroyum, sum hevur umleið helvtina av oljusøluni og í fjør umsetti fyri 250 mill. kr.

Í Danmark hevur Esso knappliga 20% av marknaðinum.

Esso ella BP

Statoil, sum er stovnað í 1972, hevur leingi havt áhuga fyri at sleppa inn í Danmark.

Statoil hevði eisini møguleika fyri at keypa BP í Danmark, men valdi Esso, tí Esso hevur oljureinsiverk í Danmark. Og slíkum verkum hevur Statoil harðliga brúk fyri. Sum er hevur Statoil bert reinsiorku til sætta partin av framleiðsluni.

Tá Statoil tann 1. juli tekur við Dansk Esso, hava norðmenn tríðingin av oljusøluni í Danmark.

Óvæntað

Tað kom rættiliga óvænta, at Exxon seldi feløg sini í Danmark og Føroyum.

Í Føroyum varð ongin spurdur og kanska heldur ongin í Danmark. Ivan Pors Fischer segði á tíðindafundinum hósdagin, at møguliga hevur stjórnin í Dansk Esso A/S vitað um ætlaðu søluna.

Knút P. Jacobsen er ikki í døpurhuga eftir søluna. Persónliga hevur hann onki móti at fara frá amerikanskari leiðslu undir norska. Ivaleyst fara norðmenn betur at skilja viðurskiftini í Føroyum. Tað verður lættari at arbeiða, nú vit ikki skula heilt til New York eftir svørum og avgerðum, vil sølustjórin hjá Esso vera við.

hd



Exxon átti Dansk Esso A/S, sum aftur átti P/f Esso.
Esso hevur verið í Føroyum í nógv ár og var ein deild hjá Dansk Esso.
P/f Esso er stovnað í 1972 og er í veruleikanum reiðariið hjá tangabátinum Esso Føroyar.
Partapeningurin er 400.000 kr. og eigur Dansk Esso A/S meginpartin.
Í nevndini í P/f Esso eru Esmar Fuglø, sum er formaður, Jákup Kass og Ivan Pors Fischer.

Sami prísur sum fyri seks árum síðani

Prísurin á gassolju lækkaði aftur í gjár. Hann fór niður um 2 kr. Lækkingin var 6 oyru og nú kostar liturin 1,95 kr.


Hetta er lægsti prísur í seks ár. Nevnast kann, at 18. apríl í 1980 var oljuprísurin eisini júst 1,95 kr.

Oljuprísurin er lækkaður 90 oyru í hesum umfarinum. Hann var 2,85 kr., tá hann fór at ganga niðureftir. Prísurin hevur tó verið uppaftur hægri onkuntíð.

Tungoljan lækkaði eisini í gjár, 80 kr. tonsið. Tungoljan kostar nú 1170 kr. tonsið.

Útlit eru framvegis fyri prísfalli.

hd



ESSO P/F ESSO

A Viðarnes
3800 TÓRSHAVN
TELEX 81358 esso fa
TLF. 1 11 33
TLGR. ADR. ESSO
POSTBOX 67
POSTGIRO 50091

Tórshavn, 24. apríl 1986

Vinarlig hellsen

f. P/F ESSO — f. DANSK ESSO A/S

Knút P. Jacobsen, sølustjóri — I. Pors Fischer, marketingchef

Hetta er brævið, sum hóskvøldið varð sent øllum størstu viðskiftavinunum hjá Esso.

Vænta ikki broyting fyribils

Esso og Shell selja olju og bensin fyri sama prís í Føroyum.

Nú Statoil hevur keypt Esso, spyrja fólk, um ein prískapping byrjar í summar. Spurt verður, um Statoil kanska fer at spæla sama leiklut sum Fossbankin millum peningastovnarnar.

Enn er helst ov tíðliga at leita eftir svari við hesum spurningi. Men helst verður støðan óbroytt. Hildið verður, at fer Statoil at royna seg við lægri prísum enn Shell, so klárar Shell at fylgja við.

Í øllum førum óttast stjórin á Shell, Hjarnar Djurhuus, ikki eina slíka kapping.

— Tað er í lagi, um vit fáa nýggja kapping, tá Statoil tekur við. Vit eiga at tola hana.

Hinvegin væntar Hjarnar Djurhuus ikki ta stóru broytingina fyribils. Stjórin á Shell sigur, at tað kom ikki heilt óvæntað, at Exxon seldi feløg sini í Danmark og Føroyum. Hann sigur, at helst hevur tilboðið hjá Statoil verið so gott, at Exxon ikki hevur hildið tað verið forsvarligt at nokta at selja.

hd

Løgmaður á amtsgarðinum í Sorø

Friggjadagin 25. apríl, flaggdagin, var Atli Dam, løgmaður móttikin av formanninum í Føroyingafelagnum á Vestursælandi, Ragnhild Sørensen, ættað úr Kaldbak, og av sosialdemokratiska amtsborgarastjóranum Søren Eriksen.

Amtsgarðurin í Sorø flaggaði henda dagin við føroyskum flaggi, og stórt hundrað fólk sungu »Sjá tú blánar«. Atli Dam helt síðan røðu, har hann greiddi frá føroyska samfelagnum og svaraði spurningum frá fólki á samkomuni á amtsgarðinum.

Fólkið var sera áhugað fyri føroyskum viðurskiftum, og nógvir vóru spurningarnir. Ein filmur um Føroyar varð sýndur.

Føroyingafelagið á Vestursælandi saman við lokalu deildini av »Foreningen Norden« hevði lagt stórt arbeiði í at ganga framsýningini »Færøerne i Fokus« á møti.

Á sjálvum amtsgarðinum var ein sera forvitnislig framsýning av føroyskum málningum og plansjum, og henda framsýning hevur vakt stóran ans millum danir.

Kvøldið fyri var løgmaður í Árhus og helt røðu fyri føroyingum har og donskum áhugaðum. Umleið 250 fólk vóru komin saman.